**Bárður S. Nielsen**
**Edmund Joensen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Magnus Rasmussen**
**Bjørn Kalsø**

**vegna Sambandsflokkin**

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið** (Broyting av heitinum endurvenjing til rehabilitering og stovnan av samskipara til rehabilitering)

# Uppskot

# til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið

(Broyting av heitinum endurvenjing til rehabilitering
og stovnan av samskipara til rehabilitering)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 80 frá 1. desember 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 6. mai 2016, verður henda broyting gjørd:

*Endurvenjing*
broytast til
*Rehabilitering*

§ 6 a. 1) Sjúkrahúsverkið veitir ókeypis rehabilitering til sjúklingar, sum hava ein læknafakliga grundaðan tørv á rehabilitering.
Stk. 2. 1) Í sambandi við, at rehabilitering verður veitt sambært stk. 1, skal sjúkrahúsverkið, í samráð við sjúklingin, gera eina tvørfakliga samskipaða rehabiliteringsætlan.
Stk. 3.1) Sjúkrahúsverkið, skal sambært stk 1. bjóða sjúklingum og /ella avvarðandi, sum hava tørv á viðgerð í einum longri tíðarskeiði, ein heilsufakligan samskipara, sum kann vegleiða og ráðgeva, og sum hevur ábyrgd av, at rehabiliteringsætlanin verður fylgd. Samskiparin skal fylgja upp og tryggja, at sjúklingurin fær eina tvørfakliga samskipaða viðgerð.
Stk. 3 verður hereftir stk. 4.
Stk. 4 verður hereftir stk. 5 1) Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur og treytir um rehabilitering, herundir hvat rehabilitering innan sjúkrahúsverkið fevnir um, og hvørji tilboð sjúklingurin kann verða ávístur til.

**§ 2**

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Bakgrund

Hetta uppskotið leggur upp til at loysa teir bráðfeingis trupulleikar, sum eru á rehabiliteringsøkinum í løtuni og seta heilsufakligan samskipara.

Í løtuni eru tríggjar lógir, sum heimila endurvenjing, t.e. lógin um sjúkrahúsverkið, lógin um heimatænastu og eldrarøkt og forsorgarlógin. Í hesum sambandi eru gjørdar nærri ásetingar og reglur um endurvenjing í kunngerð, t.e. lógin um sjúkrahúsverkið og forsorgarlógin.

Sjálvt um kunngerðirnar vísa til samstarv, so eru tað fleiri tænastur, sum enn ikki verða veittar borgaranum, t.d. ongin samskipari, sum er beinleiðis knýttur at sjúklinginum og teimum avvarðandi og sum kann tryggja og hava ábyrgd av teimum heildartænastum, sum borgarin skal hava, øll kunnu ikki fara til venjing á staðnum, har tey búgva, nærum ongin taluundirvísing og ongi skipað tilboð frá sálarfrøðingi. Møguleiki fyri taluundirvísing er ógvuliga avmarkaður í løtuni og fer fram í nøkrum førum hjá Sernám ella keypt frá privatari ráðgeving.

Viðmerkjast skal, at ein rehabiliteringsskipan byggir á ta fortreyt, at talan er um viðgerð í longri tíðarskeið. Sjúkralegur í styttri tíðarskeið krevja ikki tað sama av avvarðandi við atliti til arbeiðsbyrðu og familjulív. Tað er ein læknafaklig meting og avgerð, hvørt talan er um sjúkralegu í longri ella styttri tíðarskeið.

Oftast eru tað tey avvarðandi, makin, foreldur, børn ella systkin, sum hava samskipandi leiklutin og uppgávuna fyri sjúklingin. Tað hoyrist oftani frá avvarðandi, at tað eru ov nógvar uppgávur, sum tey skulu taka sær av og uppgávur, sum tey ikki megna at taka sær av.

Áðrenn sjúklingurin verður útskrivaður av sjúkrahúsinum er neyðugt, at tað er klárt at taka ímóti heima. Møguligar bústaðarbroytingar skulu gerast og avtalað um heimatænastu, sjúkrarøkt, persónliga røkt og stuðul skal gerast. Sum oftast er tað makin ella annar avvarðandi, sum er samskipari av hesum.

Tey avvarðandi hava nógvar uppgávur í einari familju, talan kan verða um barnafamiljur, ella eina vanliga familju, har børn, familjan, arbeiði, hús og heim eisini skulu røkjast.

Fíggjarliga koma familjur oftani í óføri, og er ein av forsyrgjarunum raktur, so eru fylgjurnar, at inntøkan minkar munandi, av tí, at bæði makin og tann sjúkuraktið ikki hava møguleika at røkja sínu borgarligu størv. Skal makin ella avvarðandi hava nógvar aðrar uppgávur umframt hesar, er vandi fyri, at ikki allar verða røktar og familjan hoknar undir trýstinum.




Royndir eru frá okkara grannalondum, at tað lættir nógv um, at sjúklingurin og teirra avvarðandi fáa ein samskipara, sum tekur sær av og hevur ábyrgdina av teimum fakligu uppgávunum og innsatsinum - sí myndina omanfyri.

Tað er vert at leggja til merkis frá okkara grannlondum, at dentur verður lagdur á rehabiliteringsútbúgvingar fyri at fáa best møguligt innihald og eisini, at settar verður á stovn læknaligar sergreinar innan rehabilitering

Viðmerkjast skal, at leikluturin hjá samskiparanum má vera óheftur av tí skipanini, sum veitir tænastuna.

Sambært lógaruppskotinum skal sjúkrahúsverkið bjóða sjúklinginum ein heilsufakligan samskipara.

Hetta málið hevur skund at fáa loyst og tí verður lagt upp til at seta nýggju skipanina við einum samskipara í verk 1. januar 2019.

<u>Endamálið við uppskotinum</u>

Endamálið við hesum uppskotinum er:

- at lógarfesta rættin til rehabilitering í breiðari merking innan fyri sjúkrahúsverkið (endurmenning og endurvenjing bæði likamliga, sálarliga og sosialt)
- at virka fyri, at virkisførleikin hjá einum sjúkuraktum verður soleiðis, at hesin aftur kann fáa eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív, sum tekur støðið í gerandisdegnum
- at seta á stovn eina samskipaða tvørfakliga heildartænastu til kropsliga, sálarliga og sosiala viðgerð
- at borgarin fær eina samskipara, sum ráðgevur, vegleiðir og í heila taki samskipar og stendur fyri, at allar neyðugar fakligar tænastur og uppgávur verða veittar
- at gera eina tvørfakliga rehabiliteringsætlan og veita tilboð um ein samskipara, sum fær ábyrgdina av, saman við læknunum, heilsustarvsfólkunum (terpeutar o.o.), sjúklinginum og teimum avvarðandi, at fremja tað, sum stendur í ætlanini - ein rehabiliteringsætlan, sum fevnir um alla heilsustøðuna hjá sjúklinginum

- at tryggja, at tann sjúkuraktið og/ ella tey avvarðandi ikki fáa truplu og tungu uppgávuna at samskipa allar tær tænastur, sum skulu veitast
- at tryggja, at orka og fígging verður sett av til endamálið

Broytingin fevnir í høvuðsheitinum um at gera eina samskipaða tvørfakliga rehabiliterings-ætlan, har støðið verður tikið í gerandisdegnum hjá sjúklinginum. Rehabiliteringsætlanin skal eisini kunna brúkast til tænastur, sum verða veittar av Almannaverkinum og kommun-unum.

Eisini skal ein heilsufakligur persónur setast og hava ábyrgd av at samskipa rehabiliterings-ætlanina, soleiðis at sjúklingurin og teirra avvarðandi ikki skulu verða noydd at taka sær av fakligum og øðrum praktiskum uppgávum. Støðan tey eru í, er oftani sera trupul framman-undan.

Tað er sera umráðandi, at tann sjúkuraktið og familjan ikki hava aðrar uppgávur annað enn hana at virka sum familja.




Samanumtikið leggur henda lógarbroyting upp til, at uppgávan at tryggja ein samskipara hereftir verður lógarfest í mun til í dag, har hetta er ein fyrisitingarlig uppgáva, sum er lýst í kunngerð, sum lættliga kann broytast og knappliga niðurraðfestast - sí myndina omanfyri.

Við hesum lógaruppskotinum verður tað løgtingsins vilji, at hetta økið fær eina munandi hægri raðfesting. Eitt nú verður lagt upp til, at hevur t.d. ein sjúklingur brúk fyri taluundirvís-ing ella tørv á sálarfrøðingi, so skal hetta verða ein rættur framyvir - javnstillað við t.d. ergoterapi ella fysioterapi.

At kunna samskifta er eitt tað mest týðningarmiklað hjá einum menniskja. Hevur ein mist sínar samskiftisførleikar ella evnini at samskifta, er tað sera týdningarmikið at fáa endur-skapt hesar førleikar við talu- og samskiftisundirvísing, soleiðis at tað eisini ber til at fáa sálarliga hjálp.

Ynskiligt er at fáa eina yvirskipaða rammulóg um rehabilitering í Føroyum, har tað t.d. verður tryggað ein tvørfaklig samskipan millum geirarnar og rætturin til rehabilitering. Lógin fer eisini at tryggja eina tvørfakliga heildartænastu til borgaran.

Allýsing av rehabilitering

Rehablitering skal taka støði í tí einastaka sjúklinginum og tí lívsstøðu, sum viðkomandi er í, umframt teimum málum, sum brúkarin setir sær.

Teoretiska grundarlagið innan gransking og menning av evninum rehabilitering, er tað bio-psyko-sociala modellið. Hetta merkir, at heilsustøðan hjá einum menniskja skal lýsast frá fleiri sjónarhornum - tí likamliga, sálarliga og sosiala sjónarhorninum. Kjarnan í hesari áskoðan er, at øll sjónarhorn hava eins stóran týdning.

Heilsustøðan hjá einum menniskja er grundleggjandi vitan fyri at kunna seta í verk rehabilitering. Tann bio-psyko-sosiala modellin gevur eina góða heildarmynd av virkisførleikanum hjá einum menniskja, og henda modellin verður eisini brúkt sum grundarlag fyri rehabilitering eftir ICF-modellinum (vegleiðing við altjóða klassifikatión av virkisføri, niðursettum virkisføri og heilsustøðu) - eitt tvørfakligt amboð, sum verður brúkt í samband við rehabilitering.

Endamálið við rehabilitering er at bøta um niðursettan virkisførleika hjá einum menniskja, soleiðis at møguleiki er at liva eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív.

Fokus er á, hvussu eitt menniskja megnar gerandislívið heima við hús, og um viðkomandi tekur lut í samfelagslívinum, hóast niðursettan virkisførleika.

"Hvidbog om rehabiliteringsbegrebet - Rehabilitering i Danmark" (2004) - grundlæggende elementer og centrale aspekter:

”Rehabilitering er en målrettet og tidsbestemt samarbejdsproces mellem en borger, pårørende og fagfolk. Formålet er, at borgeren, som har eller er i risiko for at få betydelige begrænsninger i sin fysiske, psykiske og/eller sociale funktionsevne, opnår et selvstændigt og meningsfuldt liv. Rehabilitering baseres på borgerens hele livssituation og beslutninger og består af en koordineret, sammenhængende og vidensbaseret indsats”.

Kelda: Rehabilitering i Danmark - Hvidbog om rehabiliteringsbegrebet, 2004

Rehabiliteringsdefinition - WHO:

"Rehabilitering kan defineres som en række indsatser, der støtter det enkelte menneske, som har eller er i risiko for at få nedsat funktionsevne, i at opnå og vedligeholde bedst mulig funktionsevne, herunder at fungere i samspil med det omgivende samfund"

Kelda: World Report on Disability, 2011 – World Health Organization & The World Bank, ©WHO, 2011.

Henda allýsingin verður brúkt í Sundhedsstyrelsen og Socialstyrelsen í Danmark.

Fyri nógvum árum síðani hildu læknar og onnur, at sjúka bara var eitt fysiologisk/biologisk fyribrigdi, sum onki hevði við sálina at gera ella tað umhvørvi, sum eitt menniskja livdi í. Tá varð sagt, at góð heilsa var tað sama sum “fravær af sygdom”. Tvs. fyribyrging og viðgerð av sjúku var ein medicinsk uppgáva, sum ein lækni skuldi ordinera.

Bio - psyko - sosiala modellin:

George L. Engel, psykiatari frá Amerika, ynskti eina meira holistiska tilgongd í samband við útgreining av sjúku. Úrslitið bleiv tann bio - psyko - sociala modellin, sum verður brúkt kring allan heimin í dag í samband við útgreining av sjúku, fyribyrging av sjúku, heilsufremjing og rehabilitering.

Hugsjónin aftanfyri bio-psyko-sociala modellinum er, at eitthvørt menniskja eigur at útgreinast frá fleiri sjónarhornum, hvar øll sjónarhorn hava líka stóran týdning.

Psyko: Sálarlig støða, socialir førleikar, sorg/trauma, átrúnaður o.a.

Bio: Kyn - aldur, likamlig sjúka, lamni (anatomi), medisinsk viðgerð, ættarbregði o.a.

Sosialt: Starv (fyrrv. el. núv.), frítíðarítriv, hjúnastøða, familja/ avvarðandi, bústaður (innrætting o.a.), fíggjarstøða o.a.

**Ummæli**
Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Av tí at talan er um at uppstiga starvsfólkaorkuna á rehabiliteringini við fysio- og ergoterapeutum, talupædagogi og neuropsykologi, er neyðugt, at peningur verður settur av á fíggjarlógini til endamálið.

Fyri samskipandi uppgávuna hjá núverandi heilsustarvsfólkum á sjúkrahúsunum, er talan ikki um at upprætta nýggj størv, men um at víðka verandi starvsinnihald. Skotið verður upp, at eitt heilsustarvsfólk fær uppgávuna at virka sum samskipari - tað kann verða sjúkrarøktarfrøðingur, sálarfrøðingur ella ein av terapeutunum. Hinvegin kann roknast við, at fyri at fáa økið at virka betri, so vil hetta hava við sær ávísar meirútreiðslur.

Sambært menningarætlanini fyri sjúkraverkið frá juni 2016, verður upplýst, at tørvurin á rakstrarjáttan fyri at uppstiga endurvenjingarøkið (rehabiliteringsøkið) er mettur til 4,850 mió. kr. árliga, hetta til fysio- og ergoterpeuti (4 mió. kr.) og sálarfrøði (850 tús. kr.). Eitt starv til ein talupædagog verður mett at kosta einar 500 tús. kr. árliga.

Samanumtikið kann roknast við einari samlaðari útreiðslu uppá 9-10 mió. kr. árliga á Løgtingsfíggjarlógini.

Góð og nøktandi rehabiliteringstilboð til eldri borgarar, kann hava við sær meirútreiðslur fyri kommunurnar til, t.d. keyp av tænastum til taluundirvísing, sálarfrøðihjálp og tól.

Tað kann kosta samfelagum nógvan pening við ikki at raðfesta førleikan hjá borgarunum at koma út í samfelagið aftur, t.e. endurinnleggingar, meirnýtsla av heilivági, óneyðuga langar sjúkrameldingar og viðgerðir, hjálp og heilivágur til avvarðandi, umframt at tey avvarðandi ikki kunnu røkja sítt starv, men mugu fáa almenna hjálp. Talan gerst um eina ónda ringrás.

Málið við rehabilitering má tí verða at skapa eina *win-win*-støðu fyri samfelagið og familjuna.

**Umsitingarligar avleiðingar**

Við tað, at virksemið økist, so vilja tað eisini fylgja við fleiri umsitingarligar uppgávur fyri ein samskipara, sum t.d. at planleggja, organisera, fyrireika netverksfundir, gera fundarfrágreiðingar, eftirlit o.a.

Í løtuni eru á sjúkrahúsunum rehabiliteringsdeildir, har neyðugt verður við uppnormeringum av starvsfólkaorku og útgerð ella amboðum.

**Sosialar avleiðingar**

Uppskotið er greitt ætlað til, at tann sjúkuraktið, avvarðandi og familjan fáa ein betri innihaldsríkan gerandisdag.

Samfelagsliga og sálarheilsuliga økir ein størri innsatsur munandi um lívsgóðskuna og trivnaðin hjá øllum teimum, sum eru í nærumhvørvinum.

**Vinnuligar avleiðingar**

Uppskotið kann hava positivar avleiðingar fyri vinnuna, í og við, at fólk við niðursettum førleika kunnu fáa møguleika at røkja eitt vart ella tillagað starv.

Við tað, at vinnan kann vera við til at skapa ein rúmligan arbeiðsmarknað, so fær hon eitt stórt goodwill og gott umdømi í samfelagnum við, at hon vísir samfelagssinni og ábyrgd mótvegis teimum við serligum avbjóðingum - geva teimum raktu og starvsfeløgunum eitt meira innihaldsríkt lív.

**Millumtjóða sáttmálar á økinum**

Uppskotið hevur við sær, at vit í størri mun kunnu liva upp til tær ásetingar, sum eru á altjóða støði, herundur ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólk-ar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarliga/búskapar-ligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Vinnuligar avleiðingar | Ja | Jai | Nei | Ja | Ja |
| Millumtjóðasáttmálar á økinum | Ja | Jai | Nei | Ja | Nei |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

Í grein 6 verður heitið “endurvenjing” skift út við heitið rehabilitering, bæði í yvirskriftini og í innihaldinum í greinini.

Í grein 6, stk. 2 verður broytingin, at gerast skal ein tvørfaklig samskipað rehabiliterings-ætlan, sum byggir á bio-psyko-sosiala modellin, sum kann geva eina góða heildarmynd av virkisførleikanum hjá einum menniskja, og henda modellin verður eisini brúkt sum grundarlag fyri rehabilitering eftir ICF-modellinum (vegleiðing við altjóða klassifikatión av virkisføri, niðursettum virkisføri og heilsustøðu) - eitt tvørfakligt amboð, sum verður brúkt í samband við rehabilitering.

Í grein 6, stk. 3 verður sum nakað nýtt, bjóðað sjúklingum og teimum avvarðandi, sum hava tørv á viðgerð í einum longri tíðarskeiði, ein heilsufakligan samskipara, sum kann vegleiða og ráðgeva, og sum hevur ábyrgd av, at rehabiliteringsætlanin verður fylgd. Samskiparin skal fylgja upp og tryggja, at sjúklingurin fær eina tvørfakliga samskipaða viðgerð.

Ein nýggj rehabliteringsskipan skipan byggur á ta fortreyt, at talan er um viðgerð í longri tíðarskeið. Sjúkralegur í styttri tíðarskeið krevja ikki tað sama av avvarðandi við atliti til arbeiðsbyrðu og familjulív. Tað er ein læknafaklig meting og avgerð, hvørt talan er um sjúkralegu í longri ella styttri tíðarskeið.

Í grein 6, verður stk. 3 hereftir stk. 4 og stk verður hereftir stk. 5.

**Til § 2**

Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi tann 25. oktober 2018

Bárður S. Nielsen

Edmund Joensen

Kaj Leo Holm Johannesen

Magnus Rasmussen

Bjørn Kalsø